FÍGGJARMÁLARÁÐIÐ
MINISTRY OF FINANCE

| FMR-Rundskriv | Dato<br>1. juli 2016 |
|---|---|
| Til: Stjórnarráðini og stovnar undir landinum | FMR j.nr. 16/00190 |
| Heiti: Rundskriv um keyp av vørum og tænastum | |

## 1. Endamál

Endamálið er at fáa meira úr peningi skattgjaldarans við at skipa landsins keyp av vørum og tænastum. Hetta vil samstundis stimbra kappingina á privata vøru- og tænastumarknaðinum samfelagnum at gagni.

Ásettar verða reglur fyri skipað keyp av vørum og tænastum til virksemið hjá landinum. Stovnar undir landinum bjóða longu í dag keyp av vørum og tænastum út á privata marknaðinum, men royndirnar verða ikki savnaðar og gagnnýttar til at menna keyps- førleikarnar.

Royndirnar skulu brúkast soleiðis, at stovnar undir landinum kunnu gagnnýta og stimbra kappingina á privatu vøru- og tænastumarknaðunum.

Víst verður eisini til frágreiðingina frá Vinnumálaráðnum um innkeyps- og útboðspolitikkin hjá landinum, har keyps- og útboðsmannagongdir eru nærri lýstar. Frágreiðingin kann takast niður av heimasíðuni hjá Vinnumálaráðnum, www.vmr.fo.

## 2. Hvat er fevnt av rundskrivinum

Rundskrivið er galdandi fyri alt keyp omanfyri 50.000 kr. u/mvg av vørum og tænastum, sum kemur undir játtanarslagið rakstrarjáttan í løgtingslóg um landsins játtanarskipan, sí tó undantøkini lýst í pkt. 6.

Rundskrivið er ikki galdandi fyri løgu- og byggiverkætlanir. Fyri byggiverkætlanir er licitatiónslógin galdandi (Løgtingslóg nr. 106 frá 15. november 1984 um útbjóðing v.m.). Hetta er tó ikki nøkur forðing fyri at leggja út byggiverkætlanir á keypsportalin hjá landinum, eins og kommunur eisini eru vælkomnar at brúka keypsportalin.

## 3. Áseting av keypsvirði

Fyri at vita í hvønn mun ávíst keyp er fevnt av rundskrivinum, so skal metast um virðið á keypi av vørum og tænastum. Virðið verður ásett soleiðis:

- Tá ið talan er um einstakt keyp av vørum ella tænastum, er samsvar millum virði og prís.
- Er talan um vørur ella tænastur, sum verða veittar afturvendandi (javnan), t.d. olja, samskifti og support, svarar virðið til hvat veitingin kostar í eitt ár.

Fyri afturvendandi veitingar verða gjørdir sáttmálar við veitara, sum í minsta lagi skulu verða fyri eitt ár í senn og í mesta lagi 3 ár.

Kvíggjartún 1 • Box 2039 • 165 Argir ☏ (+298) 35 20 20 • 🖷 (+298) 35 20 25 • ✉ fmr@fmr.fo • www.fmr.fo

Fíggjarmálaráðið hevur heimild at gera rammusáttmálar fyri ávísar vørur og tænastur fyri alt landið, t.d. fyri keyp av olju, trygging, og teldum. Fíggjarmálaráðið kann eisini gera av at nýta SKI (Statens og Kommunernes Indkøbs Service A/S) sáttmálar, sum rammusáttmálar fyri ávísar vørur og tænastur. Á teimum økjum rammusáttmálar eru galdandi, skulu allir stovnar fylgja hesum rammusáttmálum. Rammusáttmálar kunnu vera lagdir til aðrar stovnar at umsita.

Eisini er møguligt, at stovnar í felag bjóða út keyp av vørum og tænastum. Í hesum liggur eisini, at ein stovnur kann keypa inn fyri aðrar stovnar.

## 4. Tilboðsfyrispurningar og alment útboð

Her verða ásettir tveir hættir at bjóða út keyp av vørum og tænastum, annar er *tilboðsfyrispurningur* og hin er *alment útboð.*

### *4.1. Tilboðsfyrispurningur*

Tilboðsfyrispurningur kann verða nýttur sum keypsháttur fyri keyp upp til 500 tús. kr. u/mvg, og verður kravt, at tilboð skulu biðjast frá í minsta lagi 2 veitarum.

Mest grundleggjandi krøvini til tilboðsfyrispurning eru:

- Tilboðsfyrispurningurin skal sendast út til møguligu veitararnar, á ein hátt sum tryggjar at teir móttaka fyrispurningin samstundis.
- Treytir og krøv til vøruna ella tænastuna skulu vera væl lýst í tilboðsfyrispurninginum.
- Um tað ikki bert er prísurin, men eisini onnur viðurskifti, sum hava týdning fyri, hvat tilboð verður valt, eigur greitt at verða tilskilað í tilboðsfyrispurninginum, hvussu nógv ymsu viðurskiftini vekta í samlaðu metingini av tilboðnum, men prísurin skal vekta í minsta lagi 50% av samlaðu vektingini, og eingi einstøk viðurskifti eiga at verða vektaði minni enn 5%.
- Veitarar fáa stutta freist at seta spurningar til innihaldið í tilboðsfyrispurninginum, eftir at teir hava móttikið hann, sí nágreining í samsvarandi broti í pkt. 4.2. Spurningar frá og svar til hvønn einstakan veitara skulu sendast til hinar veitararnar.
- Í tilboðsfyrispurninginum skulu tíðarfreistir vera fyri, nær tilboðini skulu vera inni, og nær avgerð verður tikin um, hvør vinnur útbjóðingina, sí nágreining í samsvarandi broti í pkt. 4.2.

### *4.2 Alment útboð*

Alment útboð skal verða nýtt sum keypsháttur fyri keyp omanfyri 500 tús. kr. u/mvg, men kann eisini verða nýtt fyri keyp undir hesa upphædd.

Almenn útboð verða lýst á keypsportalinum, soleiðis at allir áhugaðir veitarar fáa høvi at geva boð upp á vøruna ella tænastuna, sum verður boðin út.

Mest grundleggjandi krøvini til almenn útboð eru:

- Treytir og krøv til vøruna ella tænastuna skulu vera væl lýst í útboðstilfarinum.
- Treytir og krøv til veitarar skulu vera væl lýst í útboðstilfarinum. M.a. verður kravd váttan frá veitarunum um, at teir ikki eru í eftirstøðu við skuld til tað almenna.
- Um tað ikki bert er prísurin, men eisini onnur viðurskifti, sum hava týdning fyri, hvat tilboð verður valt, so eigur greitt at verða tilskilað í útboðstilfarinum, hvussu nógv ymsu viðurskiftini vekta í samlaðu metingini av tilboðnum, men prísurin skal vekta í minsta lagi 50% av samlaðu vektingini, og eingi einstøk viðurskifti eiga at verða vektaði minni enn 5%.
- Veitarar fáa eina freist á eina til tvær vikur at seta spurningar til innihaldið í útboðstilfarinum. Tað hevur stóran týdning, at partarnir hava skilt hvønn annan, áðrenn veitararnir fara í holt við at fyrireika tilboðið. Tá slepst undan, at avgerðir verða tiknar á skeivum grundarlag, og at misskiljingar koma fram eftir, at avgerð er tikin um, hvør

vinnur útbjóðingina. Spurningar frá og svar til hvønn einstakan veitara verða fráboðað keypsportalinum, sum partur av útboðstilfarinum.

- Í útboðstilfarinum skulu tíðarfreistir vera fyri, nær tilboðini skulu vera inni, nær tilboðini verða almannakunngjørd, og nær avgerð verður tikin og almannakunngjørd um, hvør vinnur útbjóðingina. Tey, ið hava givið tilboð, eiga fáa møguleika fyri at vera hjástødd, tá ið tilboðini verða almannakunngjørd. Tað er ikki altíð, at avgerðin um, hvør vinnur útbjóðingina, fellur samstundis sum almannakunngeringin av tilboðunum. Tað kann verða neyðugt at kanna um fortreytirnar í útboðstilfarinum eru fylgdar, áðrenn endalig avgerð verður tikin um, hvør vinnur útbjóðingina. Almannakunngering fer fram á keypsportalinum.

**5. Mál**
Málið í tilboðsfyrispurningum og útbjóðingartilfari annars, skal vera føroyskt.

**6. Undantøk**

- Rundskrivið er ikki galdandi fyri serviðgerð uttanlands ella fyri keyp av vørum og tænastum til víðarisølu hjá Apoteksverkinum og Rúsdrekkasølu landsins.
- Rundskrivið er ikki galdandi fyri KT-veitingar, har virðið á sáttmálanum er undir 500.000 kr. u/mvg. Fyri keyp av vanligum KT-útbúnaði er markið tó 50.000 kr. u/mvg.
- Rundskrivið er ikki galdandi fyri medicoteknisk tól, har virðið á sáttmálanum er undir 200.000 kr. u/mvg.
- Rundskrivið er ikki galdandi fyri viðlíkahald, eftirlit og keyp av eykalutum, har upprunaliga vøran ella tænastan er bundin at ávísum veitara.
- Rundskrivið er ikki galdandi fyri keyp frá lógarásettum monopolveitarum, t.d. elveiting frá SEV, heilivág frá Apoteksverkinum og rúsdrekka frá Rúsdrekkasølu landsins.
- Ásetingin um, at málið skal vera føroyskt er ikki galdandi fyri vørur og tænastur, har eingin veitari er í Føroyum. Í slíkum førum eigur ein føroysk útgáva av útbjóðingini eisini at verða lýst á keypsportalinum, soleiðis at møguligir føroyskir veitarar kunnu bjóða seg fram. Føroyska útgávan kann vera ein samandráttur av útbjóðingartilfarinum.
- Keyp av vørum og tænastum verða ikki boðin út, um mett verður, at kostnaðurin av útbjóðing verður ov stórur í mun til væntaða sparing. Slíkar metingar við grundgevingum skulu fráboðast til keypsportalin, men verða ikki almannakunngjørdar.
- Verður mett neyðugt við undantaki, sum ikki er fevnt av ásetingunum omanfyri, ber til at senda fyrispurning til keypsportalin. Veitt undantøk verða upplýst á keypsportalinum.

**7. Vegleiðing**
Fíggjarmálaráðið, Gjaldstovan og stovnar við drúgvum royndum við útbjóðing av keypi av vørum og tænastum skipa eitt toymi, hvørs uppgáva verður at vegleiða um keyp og útbjóðingarhættir. Toymið hevur eisini til uppgávu at gera tilmæli viðvíkjandi fyrispurningum um undantøk.

Vegleiðingar o.t. verður lagt á keypsportalin.

**8. Verkseting**
Stovnarnir skulu í roknskaparreglugerðini greina, hvussu keyp av vørum og tænastum er skipað. Stovnarnir eiga at viðvirka til, at starvsfólk, sum standa fyri keypi av vørum og tænastum, luttaka á skeiðum, sum verða fyriskipað.

**9. Fráboðanir**
Fyri at gagnnýta royndirnar og menna førleikarnar hjá teimum, ið keypa inn fyri landið, skulu allir tilboðsfyrispurningar, almenn útboð, avgerðir við grundgevingum og gjørdir keypssáttmálar fráboðast til keypsportalin.

**10. Ábyrgd**
Einstøku stjórnarráðini hava ábyrgd fyri, at stovnar undir ráðnum fylgja rundskrivinum. Kærur, um at stovnar ikki fylgja ásetingunum, verða viðgjørdar av avvarðandi stjórnarráði.

**11. Eftirlit**
Fíggjarmálaráðið ger ársfrágreiðing fyri landið, sum verður almannakunngjørd á keypsportalinum.

**12. Gildiskoma**
Hetta rundskrivið kemur í gildi 1. august 2016. Samstundis fer úr gildi rundskriv um keyp av vørum og tænastum, dagfest 1. oktober 2013.

Fíggjarmálaráðið, 1. juli 2016

**Kristina Háfoss**
landsstýriskvinna

/ **Bjarni Askham Bjarnason**
aðalstjóri